# Málningar úr Leeds

Í hesum døgum hava umboð fyri tey sinnisbrekaðum í hesum enska býnum eina framsýning við listarverkum í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin lat upp í gjár og er opin heilt fram til 15. desember, hvønn dag frá kl. 13 til 18. Stongt er sunnudagar.

Á framsýningini eru so nógvir málningar at neyðugt er at hava tvær framsýningar. Tann fyrra framsýningin er opin til hósdagin í næstu, og tá letur so tann seinna framsýningin upp.

Íalt verða 75 listarverk á framsýningini.

**sb.**



*Andy Asqwith hevur málað fleiri málningar. Her situr hann millum tveir teirra*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


P/F ALMA Munters

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondenstrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

**Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn**
**Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00**
**Mail: henrik@alma.fo**




HoHoHo

Nógu nýggj og lekkur klæðir til dreingir og gentur frá:
PHINK, FRANSA og PH 8-16 ár,
eru at finna á 2. hædd í Bamsuni



Á 1. hædd hava vit sera breitt úrval av EXIT Barnaklæðum



VÆLKOMIN Í
BAMSUNA
N. Finsensgøta 20 • 100 Tórshavn • Tlf. 32 25 50



PRÓVDÓMARI

Søkt verður eftir próvdómara til Koyrikortdeildina at seta skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt fulltíðarstarv.

UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir í høvuðsheitum um:

- Fyriskipan av koyriroyndum
- Próvdøming av ástøðis og verkligum koyriroyndum
- Dagføring og tilrættisleggjan av próvtilfari
- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Aðrar uppgávur eftir tørvi

FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við námsfrøðiligum førleika ella líknandi, sum hevur kunnleika til ferðsluástøði og biltekniska økið. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og evni og áhuga at arbeiða sjálvstøðugt við fólki. Viðkomandi má vera fyrikomandi og kundavinaligur, og kunna taka sjálvstøðugar avgerðir í samsvari við galdandi reglur á økinum. Kunnleiki til teldu er ein fyrimunur, og koyrikort til bil ein treyt.

SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvsetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir saman við prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. desember 2005.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

REPROZ

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

Joha og Exit barnaklæðir og klæðir til vaksin í ymsum kendum merkjum, fáast fyri lágprís á Staravegi 7.

Inngongd saman við Teir & Tara




Lágpríssølan